## BRÚKARATEIGURIN

# At fáa klisturmerki av

**Spurningur:** Tað kemur meir enn so fyri, at klisturmerki sita á nýggjum vørum (og gomlum køliskápum!). Hvussu fái eg tey av?

**Svar:** Tað veldst um, hvar klisturmerkið situr.

Um talan er um klæðir, ið kunnu vaskast í 60 stigum, skalt tú fyrst smyrja blettin við matarolju. Lat síðani klæðini liggja í 4-6 tímar. At enda verða klæðini vaskaði í minst 60 stigum.

Er talan um klæðir, ið einans kunnu vaskast í 40 stigum, skalt tú fyrst smyrja blettin við uppvaskisápu við ongum litevni í. Legg siðani klæðini í ein plastposa í 4-6 tímar. At enda verða klæðini vaskaði sum vanligt.

Um klæðini ikki kunnu vaskast, ella um bletturin ikki er burtur, skalt tú varisliga gníggja blettin við acetone ella benzin. Royn fyrst á einum ósjónligum stað.

Tá klisturmerki situr á øðrum lutum, skalt tú fyrst skræða so nógv av sum til ber. Smyr síðani matarolju á blettin og lat han liggja í eitt korter ella so. Skava restina av klistrinum av og vaska við uppvaskisápu ella, um tilfarið loyvir tí, við benzini.

Um tú skalt hava klisturmerki av vindeygum o.l. ber til at hita merkið við einum hárturkara. So er nógv lættari at toga tað av.

*Kelda: Forbrugerrådet*

# Matur til børn er dýrur og søtur

**Hugsa teg um, tá tú keypir morgunmatarvørur til børn. Tær eru dýrar, og minna mest av øllum um góðgæti, køkur og dessert.**



Nógvar matvørur verða marknaðarførdar beinleiðis til børn. Tað verið seg gjøgnum sjónvarp, bløð, pakkitilfar og har vøran er at finna í handlinum. Um tú keypir vøruna fært tú eisini leikur, góðgæti, savnilutir ella møguleika at luttaka í onkrari kapping.

Alt hetta eru óbeinleiðis áheitanir á børnini, um at lokka foreldrini at keypa ávísar vørur, tá ið keypt verður inn. Vit hava verið og keypt inn og hava funnið nakrar vanligar "barnavørur" til morgunmat, mjólkar- og ostavørur, og søtir drykkir.

### Søt, søtari, søtast

Sum heild er matur til børn alt ov søtur. Børn eiga ikki at fáa meir enn 10% av orkuni frá sukuri. Hetta eru 30g av sukuri dagliga til eitt trý ára gamalt barn, 40g til eitt seks ára gamalt og 50g til ein 13 ára gamlan tannáring.

- Øllum børnum dáma væl tað, sum er søtt, men sum foreldur kunnu vit venja børnini til minni søtan mat, sigur Nina Due Jensen, bromatologur (matvøruverkfrøðingur) frá danska Brúkarastýrinum. Kannigar vísa, at trý av fýra skúlabørnum í Danmark, fáa ov nógv sukur. Hetta kemur í mestan mun frá góðgæti, køkum og søtum drykkum.

Morgunmatarvørur til børn eru ofta sera søtar. Til dømis er innihaldið av sukuri í Frosties, Chokos og Gullkornið 40-50g av hvørjum 100g. Her ber til at lata børnini blanda søta morgunmatin við havragrýnum ella cornflakes. Soleiðis verður morgunmaturin sunnari og børnunum dáma val at sleppa at blanda sjálvi.

### Smá jogurt eru dessert

Tá talan er um jogurt og aðrar mjólkarúrdráttir, vísti ein kanning frá 1996, at sukurinnihaldi í smáu 'kvarkdessertunum' og nógvum fruktjogurti var hægri enn 10g fyri hvørji 100g og 4g av feitti fyri hvørji 100g. Tað er tískil ikki ráðiligt at geva børnunum hesar vørur við í matpakkan ella til morgunmat. Tá er betur at eta vanligt jogurt. Smáu 'kvarkdessertirnar' eru at sammeta við ís og eiga tí einans at etast av og á.

### Syntetiskir ostar

Ostabitar, til dømis Lillebror Ostehaps, -ostafigurar og Twister eru dýrar vørur í mun til vanligan skeriost, men kunnu kanska venja børnini við at eta ost. Tó eru litevni, baconsmakkur og tilsetingarevni í Twister, sum kámar útyvir ostasmakkin og gevur eitt syntetiskt smakkiupplivilsi.

### Tað søta tekur matarlystin

Søtir drykkir - saft og sodavatn innihalda sukur ella søtevni og tilsetingarevni.

- Um børn drekka og eta nógv søtt, orka tey ikki at eta sunnan mat, sigur Nina Due Jensen, og tá fáa børnini ov fáar vitaminir og onnur føðsluevni. Kostkanningin vísti okkum, at børn sum fáa nógv sukur í matinum fáa minni mjólk, korn og grønmeti enn børn sum ikki eta og drekka seg mett í tí søta.

*Kelda: Margit Andersen Forbrugerstyrelsen*


Bústevnan Hús & Innbúgv

3. , 4. og 5. mai verður Ítróttarhøllin í Runavík karmur um størstu messu nakrantíð innan føroyska byggimarknaðin og innbúgv.

Skalt tú byggja nýtt ella umvæla gamalt, so er vert at leggja leiðina framvið í Runavík og fáa allskyns hugskot og tilboð heim við til húsa aftur.

Allar førandi fyritøkur sum hava eitthvørt við føroyska byggimarknaðin ella innbúgv at gera, verða umboðaðar.

Opið er allar dagarnar frá kl. 10.00 - 20.00
Ókeypis atgongd.
Børn bert atgongd saman við vaksnum.



Høvuðsstuðul hjá Hús & Innbúgv
FØROYA SPARIKASSI

HÚS & INNBÚGV
Postbox 169 • FO-620 Runavík
Tel 44 91 91 /45 63 98 Fax 44 86 35
Fartel 22 29 82 / 26 15 44
Email nhj@post.olivant.fo




## UTTAN ÚR HEIMI

Búskapur og vinna:

### Selja meira

Danski útflutningurin til londini í Eysturevropa veksur støðugt. Sambært einari uppgerð var útflutningurin í fjør 22,8 mia. krónur, og tað var heili18,9 prosent meiri enn árið fyri. Við hesum er Eysturevropa vorðið fimtistørsti marknaðurin hjá donskum útflutningi, og danir selja nú meiri til Eysturevropa enn til stór ES-lond sum Frakland og Italia. Her kann verða nevnt, at Noreg er fjórðistørsti danski marknaðurin.

Av londunum í Eysturevropa eru tað Russland og Póland, sum keypa mest úr Danmark. Tey bæði londini keyptu í fjør matvørur, kemiskar vørur, innbúgv, byggitilfar o. a. úr Danmark fyri 13 mia. krónur.

### Fleiri húsagangir

So nógvir norðmenn eru farnir á húsagang í ár, at talan er um ein munandi vøkstur samanborið við onnur ár. Talið á húsagangum yvirhøvur var annars 6,6 prosent minni tríggjar fyrstu mánaðarnar í ár enn somu mánaðir í fjør, men talið á einstaklingum, sum fóru á húsagang, vaks hinvegin nógv.

Sambært almennu skrásetingini vórðu 970 húsagangir skrásettir í januar ársfjórðingi, og ein triðingur var einstaklingar. Ein orsøk er, at fleiri sjálvstøðug vinnurekandi eru givin ella noydd at gevast.

### Bíligari telefon

Danska telefelagið TDC, sum er fyrrverandi Tele Danmark, hevur fingið boð um at lække prísirnar hjá teimum privatu viðskiftafólkunum. Boðini eru komin frá kappingarmyndugleikunum. Sambært teimum skal TDC lække prísin tey næstu trý árini, og tá verða prísirnir 28 prosent lægri, enn teir vóru í 1998. Tað árið fekk TDC fyrstu ferð boð um at lække prísin.

# Eingin vón um frið í Miðeystri ta fyrstu vikuna

**Ísraelski forsætisráðharrin, Ariel Sharon, hevur gjørt greitt, at hann vil hava Arafat burtur**

Serligi ST-sendimaðurin, norðmaðurin Terji Rød Larsen, væntar, at tann spenta støðan í Miðeystri fer at standa við í minsta lagi eina viku afturat, og at hesa vikuna er eingin vón um frið.

Hann vísir á, at tær áhaldandi palestinsku sjálvmorðsbumbuatsóknirnar og serstakliga tann seinasta í býnum Netanya hava gjørt, at ísraelska fólkið av fullum huga styðjar politikkin hjá Ariel Sharon, forsætisráðharra og stjórn hansara. Tí væntar hann ikki, at tað fer at bera til at fáa Ísrael at slaka í bræði.

Hinvegin heldur Terje Rød Larsen, at tað er rætt at halda fram við áhaldandi diplomatiskum trýsti á bæði ísraelsmenn og palestinar.

### Farið við honum!

Síðani ísraelski herurin tók seg inn í Ramallah, hevur palestinski leiðarin, Yasser Arafat, sitið innibyrgdur á skrivstovu síni, og ísraelska stjórnin hevur gjørt greitt, at hann sleppur ikki út haðani.

Jú, hann kann sleppa út, segði Ariel Sharon týskvøldið, men hann legði tríggjar treytir við. Tann fyrsta var, at ráðharrar hansara tóku undir við tí, onnur var, at palestinar gingu við til vápnahvíld, og tann triðja treytin var, at Arafat fekk ein einvegis ferðaseðil, um onkur vildi taka hann við sær.

Tað vil siga, at Arafat kann sleppa burtur haðani, men heimaftur sleppur hann ikki.

Tað hevur verið nevnt, at ísraelsmenn ætla at reka Arafat í útlegd, men hesum hava bæði USA og ES ávarað Ísrael ímóti.



*Yasser Arafat kann fáa ein einvegis ferðaseðil, vil onkur taka hann við sær, sigur Ariel Sharon. Heimaftur sleppur hann ikki*

*Mynd: Reuters*

# Oddamaður í al-Qaeda tikin

**Ein av teimum leiðandi monnunum í yvirgangsfelagsskapin um al-Qaeda er tikin í Pakistan**

YVIRGANGUR
*Árni Joensen*

Tað var amerikanski verjumálaráðharrin, Donald Rumsfeld, sum boðaði frá, at Abu Zubaydah var tikin í Pakistan. Rumsfeld segði, at maðurin hevur verið ein av leiðarunum í al-Qaeda, og seinni segði talsmaðurin hjá Hvítu Húsunum, Ari Fleicher, at amerikanska stjórnin hevur álítandi ábendingar um lutin hjá Abu Zubaydah í yvirgangsfelagsskapinum hjá Osama bin Laden.

Sambært Ari Fleicher hevur pakistanska løgreglan leitað leingi eftir Abu Zubaydah. Tann 28. mars kom løgreglan fram á hann. Zubaydah royndi at flýggja og varð raktur av fleiri skotum frá løgreglumonnunum, sum síðani tóku hann. Maðurin hevur síðani fingið viðgerð á einum hernaðarsjúkrahúsi í Pakistan.

Talsmaðurin hjá amerikanska uttanríkisráðnum, Philip Reeker, segði í gjár, at Abu Zubaydah hevur verið høgra hond hjá bin Laden, og hann metti handtøkuna sum eitt álvarssamt bakkast fyri al-Qaeda. Hann rósti samstundis pakistanska forsetanum, Pervez Musharaf, fyri tað dirvið, sum hann hevur víst við at fara í hernað ímóti víðgongdum muslimskum felagsskapum í Pakistan.

Spurdur, um talan veruliga er um Abu Zubaydah, svaraði Philip Reeker, at tað er alt, sum bendir á tað. M. a. hava fólk, sum kenna hann, greitt løgregluni frá, hvør hann er. Amerikanskir umboðsmenn skulu nú avhoyra tann tikna.

Úr Norðurlondum:

### Færri koma

Talið á útlendingum, sum leita sær til Danmarkar at fáa friðskjól ella uppihaldsloyvi, er minkað nógv í seinastuni. Sambært Reyða Krossi komu 1.195 útlendingar til Danmarkar í hesum ørindum fyrsta ársfjórðing í ár. Somu mánaðir í fjør var talið 2.409.

Ráðharrin í innflytaramálum, Bertel Haarder, er ikki í iva um, at tað er tann nýggi innflytarapolitikkurin, sum hevur havt sína ávirkan. Hann sigur, at tíðindini um tær nýggju og strangaru donsku reglurnar frættust víða beinanvegin, og at tað hevur fingið fólk, sum ætlaðu sær til Danmarkar, at setast aftur ella at leita til okkurt annað land.

### Jødar hóttir

Jødiska trúarsamfelagið í Noregi hevur biðið myndugleikarnar gera okkurt fyri at steðga teimum nógvu rasistisku álopunum, sum hava verið á internetinum seinastu tíðina.

Leiðarin hjá norsku jødunum, Rolf Kirschner, sigur, at trúarsamfelagið hevur verið fyri nógvum álopum í seinastuni, og hesi eru komin á internetinum, í telefonini ella í vanligum posti. PLO-umboðsmaðurin í Oslo, Omar S. Kitmitto, heldur hinvegin ikki, at norsku jødarnir hava nakað at stúra fyri. Teir hava ikki skyldina av tí, sum Sharon ger, sigur Kitmitto.

### Søgdu nei

Nevndin í danska lærarafelagnum hevur mælt limunum til at vraka semingsuppskotið, sum semingsmaðurin legði fyri feløgini, sum hava sáttmála við tað almenna. Tað var væntað, at nevndin í lærarafelagnum fór at mæla sínum 70.000 limum at vraka uppskotið.

Kortini verður hildið, at tey flestu av teimum 650.000 alment løntu fara at taka undir við semingsuppskotinum.